# Turið — fiskadoktarin úr Klaksvík

Hon var klár at flyta heim til Føroyar, har hon vónaði at fáa eitt starv á studentaskúlanum við Gøtugjógv. Hon stóð og bíðaði. Men tilvildin vildi tað annarleiðis. Rektarin við Gøtugjógv bíðaði nakrar tímar ov leingi. Í staðin hava føroyingar fingið fyrsta fiskadoktaran

DOKTARI

*Jógvan Hugo Gardar*

Turið Mørkøre fór til Århus at lesa seinast í áttatiárunum. Hon las lívfrøði. Samstundis fann hon sær ein norðmann. Tey ferðaðust millum Oslo og Århus í eina tíð. Tá so Turið var liðug við fyrsta part av lesnaðinum í Århus, valdi hon at flyta til Oslo, har hon ætlaði sær at halda fram á lærda háskúlanum.

Men har byrjaði hon ongantíð. Ein lestrarmøguleiki á landbúnaðarskúlanum í Ås stutt sunnan fyri Oslo lokkaði meir.

- Eg helt, at hetta ljóðaði spennandi, og so var tað meir praktiskt. Ein skuldi ikki bara lesa um lívfrøði, men eisini gera meir royndir og kanningar, sigur Turið Mørkøre, tá vit hitta hana á skrivstovuni hjá Akvaforsk í Ås.

Turið hevur dámt væl at vera á Ås. Hon las um húsdjór og skrivaði høvuðsuppgávu um laks í 1995. Samstundis las eisini føroyska Durita Brattaberg umhvørvislæru har. Árið fyri tók ein annar føroyingur, Hørður Wardum, prógv á Ås.

Ås landbrukshøgskole hevur havt nógvar føroyingar sum næmingar, men í løtuni er eingin føroyingur næmingur á skúlanum. Hetta heldur Turið vera synd.

- Her hava nógvir føroyingar lært landbúnað, umhvørvi, skógarrøkt, og nú eru vit millum tey bestu innan aling eisini, so tað skuldi verið góðir møguleikar at fingið útbúgvingar her sum passa føroyska samfelagnum.



*- Toskurin er eitt góðdýr at arbeiða við — nógv lættari enn laksurin. Men toskurin er samstundis ein serskøltur, hann etur til dømis ikki hvat sum helst. Hetta royna vit so at finna nærri út av, sigur Turið Mørkøre*

### Bleiv verandi

Sjálv hevði Turið ætlað sær heimaftur til Klaksvíkar at búgva og arbeiða. Hon hevði lagt ætlanirnar fyri rektaran á Studentaskúlanum og H.F. í Eysturoy og í Klaksvík. Turið vildi undirvísa í lívfrøði á skúlanum, sum í síni tíð hevði givið henni brell til hetta fak.

- Í dag kann eg takka Dánjal Petur Højgaard, ið eg hevði í lívfrøði á H.F. í Klaksvík, fyri at eg valdi hendan lesnaðin. Hann tók okkum við kring um oyggjarnar og vístu okkum lívfrøði í veruleikanum. Vit vitjaðu millum annað ali- og smoltstøðir. Tímarnir saman við Dánjal Peturi gjørdu, at eg av álvara fekk hug til lívfrøði og serliga tokkan til aling og alifrøði.

Men tað vóru eisini onnur sum gjarna vildu hava Turið í starv. Úti á Ås høvdu fólk á Akvaforsk, ið er ein egin stovnur, bitið merki í ta dugnaligu kvinnuna. Turið bleiv spurd, um hon vildi byrja í einum starvi á Akvaforsk.

- Vit høvdu avgjørt, at vit skuldu flyta til Føroyar, men vit vistu onki, um eg fekk starv ella ikki. Meðan eg bíðaði eftir svarinum úr Gøtugjógv, so togaðu tey á Akvaforsk meir og meir í meg. Tá eg so mest sum hevði mist vónina um at fáa starv í Føroyum, valdi eg at taka av tilboðnum frá Akvaforsk. Sum lagnunnar speisemi so ringdi telefonin, tá eg kom heim hendan sama dagin. Nú var alt klárt til mín við studentaskúlan í Gøtugjógv. Eg skuldi sleppa at undirvísa bæði í Eysturoynni og í Klaksvík.

Turið noyddist at siga sum var. Hon hevði bert fáar tímar innan sagt ja til eitt starv á Akvaforsk. Har skuldi hon granska. Hon fór um sama mundið eisini undir at skriva lærubók um fóðurlæru. Tá hon nú var komin í gongd við gransking og skriving, setti hon sær fyri at taka doktaragradsstudie.

### Tann norski hátturin

Í heyst vardi hon doktararitgerðina um laks og fekk sera góð ummælir. Ritgerðin er býtt upp í trý høvuðsevni: fitiinnihald, fastleiki og úrtøka.

Millum annað so hevur Turið Mørkøre í sambandi við hesa uppgávuna gjørt nógv fyri at finna ein skjótan og lættan hátt at siga nakað um fastleikan hjá fiskinum.

- Higartil hava vit ikki havt ein felags hátt sum sigur, hvussu fastleiki skal metast og roknast út. Hetta vildi eg gera nakað við, og tað sum eg fann út av hevur víst seg at vera bæði skjótari og lættari at brúka enn tað vit hava havt, sigur Turið.

Uttan at fara neyvari inn á hendan metiháttin, kunnu vit staðfesta, at fleiri fyritøkur nú brúka háttin hjá Turið, ið hevur fingið heitið "The Norwegian Method." Millum annað hevur stóra altjóða fyritøkan Nutreco valt at brúka metiháttin hjá Turið á øllum sínum virkjum.

- Fyrimunurin er, at hann er skjótur, neyvur og lættur at brúka. Úrslit kunnu samanlíknast lættari, og tað hevur einki at siga, um kanningarnar eru gjørdar í Kili, Skotlandi, Føroyum ella Noregi sigur Turið.

### Toskurin tað næsta

Turið, sum ungdómsárini arbeiddi á Kósavirkinum og Dávavirkinum í Klaksvík, dámdi best at rokast í saltfiskinum.

- Mær dámdi so ólukksaliga væl at vera við til at landa saltfisk. Tað var altíð stuttligt at vera í lastini saman við javnaldrum og so dámdi okkum at hoyra tey eldru siga frá og ikki minst reypa, sigur Turið.

Í dag er Turið nógv úti á alistøðum og arbeiðsplássum í fiskivinnuni. Sjálvt um hon í dag fæst nógv við neyvar kanningar og nógv tøl, so er pláss fyri látrinum og løttum tosi.

Aftaná at hava arbeitt nógv við laksi seinastu árini, er hon nú í gongd við at hyggja nærri eftir einum komandi alifiski — toskinum.

- Toskurin er eitt góðdýr at arbeiða við — nógv lættari enn laksurin. Men toskurin er samstundis ein serskøltur, hann etur til dømis ikki hvat sum helst. Hetta royna vit so at finna nærri út av, sigur Turið.

Starvið hjá henni á Akvaforsk er fjølbroytt, so samstundis sum hon sjálv er við í verkætlanum, hjálpir hon eisini næmingunum sum nú læra um aling og evni, sum hava við aling at gera. Hjá Akvaforsk hava tey bæði almennar granskingarætlanir samstundis sum tey eisini gjøgnumføra kanningarætlanir fyri fyritøkur. Millum annað kann nevnast ein stór kanning fyri fóðurframleiðaran EWOS, har góðskan í norskum og føroyskum laksi hevur verið kannað. Hetta er tann størsta og mest umfatandi kanningin av føroyskum fiski nakrantíð. Alifiskurin er fylgdur frá hann bleiv settur í sjógvin og til hann bleiv tikin tvey ár seinni. Hendan kanningin er um at vera liðug. Úrslitini fyriliggja eftir ætlan fyrst í komandi ári.

- Umhvørvið her á Ås er broytt nógv hesi árini. Tá eg kom, var alifiskur bert ein lítil partur av lesnaðinum um húsdjór. Nú hava vit egna útbúgving innan aling av fiski, og næmingar úr øllum heiminum koma hendanvegin at nema sær kunnleika.



# Krígseingilin San Miguel og tey hugnaligu jólini

- Eg ógvaðist við, tá ið eg sá múraða mynd av San Miguel einglinum við svørði í hond, traðkandi á tann leinkjaða djevilin, sum er ímyndaður sum ein svartur maður úr Afrika. Tað hugnaliga og jólaliga lið um lið við tí óhugnaliga, makabra og djúpt rasistiska - og alt í átrúnaðarsins heilagu ørindum, hugleiðir Durita Holm úr Spania




HUGLEIÐINGAR

*Durita Holm*

Tá eg haldi jól langt heimanífrá, ger frástøðan, at øðrvísi tankar um høgtíðina og tað sum liggur aftanfyri hana, stinga seg upp. Slík sundurgreining er ikki serliga jólalig, og tí dámar mær best at halda jól heima í Føroyum, har tað vælkenda heldur tankarnar burtur og eg bara njóti hugnan.

Jólini eru sjálvt høvuðssúmbolið uppá kristindómin. Sjálvt tey, sum vanliga ikki hava trúnna í huganum, fara ta einu ferðina um árið í kirkju at hoyra Guds orð.

Tað átrúnaðarliga er tó bara ein partur av jólunum, minst líka stórur partur er tað týdningarmikla mentunarliga ritualið. Øll hava eina hugmynd av, hvussu jólini eiga at vera, stemningurin, hvat man eigur at eta og hvussu man eigur at vera ílatin.

Eg havi hildið jól í ymiskum londum, og mær dámar tað einki serligt, tí súmbolikkurin í jólunum er so sterkur, at eg ikki megni at skúgva hugmyndina av føroyskum jólum frá mær, hvussu jólini eiga at vera. Frástøðan ger tó eisini, at hvørji jól í útlegd koma tankar og myndir um egna mentan og um, hvat jólini í grundini eru fyri nakað.

Nú er aftur desember og hesaferð eri eg í Spania. Her halda tey eisini jól, men tað eru katólsk jól. Her eru ikki so nógvir jólamenn, men nógvir vísmenn, esil, Jesusbørn og ymisk halgimenni. Tann spanska trúgvin er nógv meira ítøkilig enn protestantisman longur norðuri. Her eru halgimenni á hvørjum horni og í hvørjum húsi, sjálvt í barnaskúlanum hongur ein stórur særdur og blóðugur Jesus á krossinum. Tú verður alla tíðina mintur á trúnna, ikki bara um jóltíðir.

Tá eg herfyri sá myndina av San Miguel múraða á uttaraveggin á einum húsum her, samstundis sum fleiri og fleiri hugnalig fjós við krubbum og hoyggi spíraðu upp allastaðni, kundi eg ikki lata vera við at vamlast eitt sindur. Flísarnir á húsinum ímynda San Miguel eingilin við svørði í hond, traðkandi á tann leinkjaða djevilin, sum er ímyndaður sum ein svartur maður úr Afrika. Tað hugnaliga jólaliga lið um lið við tí óhugnaliga, makabra og djúpt rasistiska - og alt í átrúnaðarsins heilagu ørindum.

Mær kom í hug jólini í Karibia. Tey vóru kristin har, men tey vóru eisini øll somul svørt fólk sum einaferð komu úr Afrika, og sum við ráðari megi vóru tvingað inn í ta sælu kristnu trúnna, somu trúgv sum tann dag í dag myndar sjálvan Fanan í teirra ímynd. Fanin er enntá í leinkjum og júst soleiðis sungu teir karibisku afrikanararnir í fleiri hundrað ár síni desperatu halleluja.

Jólini heima bera boð um næstrakærleika, tolsemi og humanismu, men hvørja ferð, eg havi hildið jól í útlondum, er mær komið í hug júst tað mótsatta. Í Ný Sælandi búði fyri bara 200 árum síðani eitt mentunarliga stórfingið fólk. So komu tey kristnu við gleðiboðskapinum um Jesusbarnið, men tað tykist mær sum at tey gloymdu boðskapin um næstrakærleika, tolsemi og humanismu. Jólini í Ný Sælandi vístu eitt framkomið land, men bara fyri eftirkomararnar hjá fólkunum, sum komu við gleðiboðskapinum. Maoriarnir, sum búðu har frammanundan, máttu taka við boðskapinum, men tað sá út til at vera verri statt við gleðini. Tað er helst einki stuttligt at verða roknaður sum annaðfloks borgari, heldur ikki á jólum.

Eisini jólini í Thailandi bóru boð um okkara ófatuligu arrogansu og mangul uppá mentunarligt sjálvsinnlit. Thailand er eitt buddhistiskt land, men har er sum kunnugt eisini ein sonn innrás av ferðafólki úr tí kristna vesturheiminum. Á jólum í ferðafólkaøkjunum í Thailandi verður sostatt prýtt við einglum og Jesusbørnum og hoteleigarar úr vesturheiminum skipa fyri stórum almennum jólatiltøkum.

Tað, sum rann mær í hug, tá eg sá allar hesar láturligu jólamenninar undur tí steikjandi ekvatorsólini, var, hvussu millum annað danir og norðmenn bera seg at, tá teir nógvu muslimarnir sum í grundini búgva í Danmark og Noregi og tí, sum natúrligt er, hava hug at hava sínar moskéir og minarettir. Tá er ikki lukkuligt. Muslimarnir sleppa at dyrka sína trúgv í okkara londum, men bara so leingi hon ikki er sjónlig í tí almenna. Vit kristnu harafturímóti ikki so mikið sum ivast í, at vit hvar sum helst, uttan mun til land og mentan, hava allan rætt til alment at vifta við okkara jólaeinglum og Jesusbørnum.

Jólini skulu vera ein so hugnalig og harmonisk tíð, og tað tykist kanska løgið at taka fram slík minni prýðilig viðurskifti í kristindóminum júst nú, men tað er ofta so, at júst tá hamurin skal vera serliga einlittur og fríðkandi, er lættast at bera eyga við tær ljótu rivurnar. Ikki minst, tá man er staddur aðrastaðni og ikki av sær sjálvum verður lullaður inn í glansimyndina.

Tað tykist kanska sum at mær ikki dámar jólini. So er ikki, men jólini eru best heima í Føroyum, tá tað er myrkt og kalt úti og man kennist við øll ritualini. Tey tingini man kennist væl við hugsar man ikki so gjølla um. Um man fer at greina eina høgtíð ov nógv, og byrjar at lýsa hana við orðum sum sosial konstruksjón og tí sum verri er, missir hon alt tað hugtakandi og tað er ikki meiningin, men tí slepst illa undan, tá man ikki er heima.

Í ár haldi eg jól í tí brøttu San Miguel gøtuni, men eg fari at gera mítt besta fyri ikki at hugsa um hendan hættisliga San Miguel, krígseingilin, og tó at eg ivist, so velji eg eisini at halda, at tað er okkara tulking av kristindóminum, sum ger hann so blóðugan.